# Flóttafólkalegur

*4.-6. flokkur*

## 1. partur – skapa eina flóttafólkalegu

**Námsætlan**: Næmingurin eigur at fata ta ábyrgd, menniskjað hevur av sær sjálvum og medmenniskjum sínum. (Kr) Søga er bæði ein hugvísindalig og ein samfelagsfaklig lærugrein. (Sø) Lærugreinin føroyskt tekur støði í næminginum í síni heild, varðar um vitbornu evnini, eins og tey kensluligu og sosialu. (FØ)

**Tilfar/amboð:** Telda at leita á google (ella myndir frá DR), A3 pappír, kartong, uppgáva 4 og uppgáva 5

**Innleiðing:**

Tosið um vatn. Hvussu nógv vatn nýta vit í gerandisdegnum? Hvussu hevði verið, um vit manglaðu vatn í Føroyum?

Hyggi at myndum á Google ella myndum frá DR av flóttafólkalegum. Tosið um myndirnar og um hvussu tað man vera at búgva har. Hyggi at filminum "Jeg drømmer stadig om Syrien."

Spyr so næmingarnar:

- Hava tit egið kamar?
- Hvønn týdning hevur tað, at hava egið kamar?
- Hvussu búgva tit?

**Frágreiðing:** Flokkurin skal nú tilevna eina flóttafólkalegu. Stórur munur er á, hvussu flóttafólkalegur eru. Summi búgva í telti, meðan onnur búgva í smáttum. Summar legur eru smáar og aðrar øgiliga stórar, alt eftir hvussu átrokandi flytingin er.

Nakrar legur eru bara fyribils settar upp, meðan aðrar hava verið til í mong ár og hava tískil handlar, innkeypssentur, heilsustøðir o.a. Í hesum legunum eru mong fødd og uppvaksin, so legan er einasta heim tey kenna, men tað er møðsamt, at vera í einari slíkari bíðistøðu í so mong ár. Eisini eru útlitini frameftir óviss og ótrygg.

**Vert at vita:** Í summum flóttafólkalegum brúka tey ein ”rulludunk”, at fara eftir vatni við. Dunkurin kann verða rullaður heldur enn borin. Dømi:

- Høvuðsskrivstova **-** at skráseta fólk, leita eftir familju/vinum, lata út skamtanarkort, húsnummar o.a.
- Streymveiting
- Felags wc og felags køk (um legan er stór kunnu vera fleiri wc og køkar.)
- Skúli

**Soleiðis gert tú:** Být flokkin í bólkar við 3-4 næmingum í hvørjum bólki. Uppgávan er tríbýtt:

- Hugarok
- Ætlan/arbeiði við at skapa eina legu
- Framløga

Hugleiðið um, hvat okkum tørvar í leguni. Hugsa um innleiðingina til evnið, myndirnar, og filmin. (Vatn, mat, læknahjálp, hús, tryggleika, útbúgving).

- Gev bólkunum nøkur A3 ørk
- Bið tey hugsa um eina lítla bygd. Hvørjum hava vit brúk fyri, skal liviligt vera í bygdini?
- Ger eina fortekning av leguni. Hvussu skal legan skipast, soleiðis at lívið gerst so gott sum møguligt fyri øll í leguni?
- Gev so næmingunum eitt kartong og bið teir gera eina myndatalvu av leguni.
- Næmingarnir leggja fram og grundeva fyri hví legan er skipað júst soleiðis.

Um skúlin hevur teldlar, ber til at gera videoframløgur.

**2. partur: Lívið í flóttafólkaleguni:**

**Tíð:** 2 tímar

**Tilfar/amboð:** Uppgáva 4 og uppgáva 5

**Soleiðis gert tú:** Gev næmingunum uppgávu 4. Næmingarnir skulu ímynda sær, at teir eru flýddir til eina flóttafólkalegu. Teir skulu hvør sær skriva dagbók um lívið í leguni, og brúka vitanina tey hava fingið, um at flýggja og um at búgva í legu langt heimanífrá.

- Hugsa um ljóð, lukt, kenslur og tankar - lýs huglagið.
- Næmingarnir kunnu lata uppgávuna inn ella lesa hana fyri flokkinum.

**Gev so næmingunum uppgávu 5**. Hyggi í atlas at Sýria og grannalondunum og tosið um kríggj og ófrið í teimum ymsu londunum. (t.d. Irak, Sri Lanka, Aserbadsjan, Congo, Sýria o.a.) Greið næmingunum frá, at ófriður og ósemjur, ið elva til, at fólk verða noydd at flyta heimanífrá, eru í mongum økjum.

Hvat høvdu næmingarnir sjálvir tikið við, um teir vóru noyddir at flýggja? Gev teimum uppgávu 5, og bið teir skriva tríggjar lutir, teir høvdu tikið við sær. Tey skulu grundgeva fyri, hví tey velja júst hesar lutirnar. Savna leparnar saman, og prátið um tey ymisku svarini.

**Vert at vita – um vatn:**Eitt fólk brúkar í meðal 114 litrar av vatni um dagin. Av hesum eru 40 litrar heitt vatn. 114 litrar er tað sama sum 41 $m^3$ hvørt fólkið/ár. .

Í einum vanligum húsarhaldi (pr. fólk) fer vatnið til:

- At vaska sær (40 um dagin – 36%)
- Skola niður (30 litrar um dagin – 27%)
- Vaska toy (14 litrar um dagin – 13%)
- At vaska upp og gera reint (11 litrar um dagin – 10%)
- Mat og drekka (8 litrar um dagin – 7%)
- Annað (8 litrar um dagin – 7%)

(Kelda: dongenergy.dk)

Skitið vatn er ein stórur trupulleiki í flóttafólkalegum. Hvønn dag doyggja áleið 1800 børn, undir fimm ára aldur í heiminum, vegna skitið vatn og væntandi reinføri, t.e. 783.000 børn um árið. Børnini doyggja av sjúkum sum kolera og diare. Sjúkur, sum elva til lívshættisligt vætutrot. Sjúkurnar eru lættar at viðgera, men tá krevst reint vatn.

Ikki skulu nógvir pengar til, at bøta um hetta. Við einari klortablett ber til at reinsa ein litur av vatni. Klor drepur bakteriur og soppar í vatninum, so tað kann drekkast. 50 tablettur kosta áleið 5 kr.

Kelda: unicef.dk og rødekors.dk